| | |
|---|---|
| **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**19. mars 2009** | Blað nr.:<br>**7781** |
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** **19. mars 2009** **kl. 17.30**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr: 72/09-88/09**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Bogi Andreasen
Marin Katrina Frýdal
Jógvan Arge
Halla Samuelsen
Jákup Símun Simonsen
Elin Lindenskov
Maria Hammer Olsen
Annfinn Brekkstein
Vagnur Johannesen
Jan Christiansen
Sjúrður Olsen

**LUTTÓK IKKI:**
Levi Mørk

**LUTTÓK EISINI:**
Heri Olsen

**SKRIVARI:**
Jens M. Poulsen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.00**

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagskránna.**

**75/09** **2008-2993**

**Mál beind í nevndir**

**Býráðið 19. mars 2009:** Tikið til eftirtektar.

**76/09** **2009-0617 KF**

**Serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 1431 við Varðagøtu.**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Byggi – og býarskipanarnevndin gav tann 30. oktober 2006 undantaksloyvi til at byggja 2x3 raðhús á matr. nr. 1431 við Varðagøtu. (j.nr. 2006-3031).

Projektið var skipað soleiðis, at tey 2x3 raðhúsini liggja hvør síni megin eitt felagsøki/tún sum bindur útstykkingina saman og atgongdin til og frá húsunum er eftir felagsøkinum har bilar kunnu ferðast undir skipaðum viðurskiftum. Við at rokna felagsøkið uppí grundøkini, kemur samlaða víddin av hvørjum grundøki uppum 300 $m^2$.

Umsitingin mælti nevndini til at ganga umsóknini á møti av tí at mett var at hetta var eitt minni frávik frá almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu við, at hetta er ein lukkað eind og at verkætlanin og skipanin var av eini slíkari góðsku at nevndin átti at loyva hesum.

Tá ið verkætlanin var liðug og stykkini skuldi matrikulerast noktaði Umhvørvisstovan at sundurbýta ognirnar við tí grundgeving at útstykkingin ikki er í samsvari við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu og Matrikullógina.

Eigarin av ognini kærdi avgerðina hjá Umhvørvisstovuni til Kærunevndina í lendismálum, har málið hevur verið til viðgerðar í uml. 1 ár. Kærunevndin í lendismálum, staðfesti fyrst í februar 2009 avgerðina hjá Umhvørvisstovuni. Kærunevndin í lendismálum vísir samstundis í svari sínum á, at málið kann loysast við at broyta byggisamtyktina.

Av hesi grund hevur umsitingin gjørt uppskot til eina serstaka byggisamtykt fyri økið matr. nr. 1431 við Varðagøtu.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at nevndin góðkennir uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 1431 við Varðagøtu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. februar 2009:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Elin Lindenskov og Bogi Andreasen samtyktu at taka undir við tilmælinum, men heitti á umsitingina um at kanna § 3 stk. 3 áðrenn býráðsfundin..

Ein minniluti: Jan Christiansen tekur støðu á býráðsfundinum.

**Býráðið 19. mars 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**77/09** **2007-2558**

**Viðv. Sundurbýti og minni fráviki av matr.nr. 801f, Tórshavn**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Eydna S. og Michael Mikkelsen søkja um undantaksloyvi og minni frávik í sambandi við sundurbýti matr. 801f, Varðagøta 17, Tórshavn.

Stykkið er 988 m² til støddar soleiðis at byggjast kann eitt sethús á tað nýggja grundstykkið.

Matr.nr.801f, Tórshavn er 988 m² til støddar.

Matr.nr.801, Tórshavn liggur í 1A: sethúsaøki.

Tekniska deild arbeiðir við at breiðka Varðagøtu, víst verður til j.nr. 2005-3136 tískil verður mælt frá, beint nú, at ganga umsóknini á møti.

Mælt verður í staðin til at svara umsøkjaranum aftur, at umbønin kann verða gingin á møti, tá ið kommunan hevur fingið avgreitt málið um breiðkan av Varðagøtu.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararktekturin mæla frá at sundurbýta matr. 801f Tórshavn, av teirri orsøk, at kommunan arbeiðir við at breiðka Varðagøtu fram við matrikul 801f Tórshavn.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. februar 2008:** Samtykt at beina málið í teknisku deild til ummælis.

**Ískoyti:**
Byggi- og býarskipanarnevndin hevur á fundi 4. februar 2008 samtykt at beina málið í teknisku deild til ummælis.

Ummælið av sundurbýtinum av matr. nr.801f, Tórshavn, við Varðagøtu:

Tekniska fyrisitingin arbeiðir við at breiðka Varðagøtu sí mál nr. 2005-3136 HMP Consult: Kostnaðarmeting og tekning av gongubreyt -vestursíða á Varðagøtu frá Varðagøtu nr. 15 til Dalagøtu.

Sambært fyriliggjandi vegaprosjekti fara 71 fermetrar burturav matikul nr. 801f, Tórshavn, ið sostatt minkar frá verandi 988 fermetrum til 917 fermetrar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararktekturin mæla frá at sundurbýta matr. 801f Tórshavn, av teirri orsøk, at kommunan arbeiðir við at breiðka Varðagøtu fram við matrikul 801f Tórshavn. Víst verður til hjáløgdu fundarfrásøgn.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. mars 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsøkjararnir hava samsvarandi samtyktini í byggi- og býrskipanarnevndini fingið svar frá Umhvørvisstovuni (Matrikulstovuni), dagfest 27. mars 2008 – j.nr. 2007-2558/8 og síðani biðið um fund við býarverkfrøðingin.

Á fundinum hjá býarverkfrøðinginum 1. apríl 2008 varð málið gjøgnumgingið og lýst frá kommununar síðu.

Umsøkjararnir komu á nevnda fundi við uppskoti um, at Tórshavnar kommuna keypir niðara part av grundstykkinum til p-pláss í økinum. Umsøkjararnir eru áhugaðir í at fáa eina loysn áðrenn summarferiuna við atliti til ætlaðu bygging teirra aðrastaðni.

Niðurstøðan á fundinum varð, at Tórshavnar kommuna umvegis ráðgeva fer at arbeiða við at leggja málið um møguligt p-pláss fyri avvarðandi nevndir og býráðið samstundis sum arbeitt verður við einum sundurbýti av 801f sum eina neyðloysn. Væntast skal ikki, at endalig støða verður fyrr enn seinast í juni 2008 – um alt gongur væl og skjótt fyri seg.

Umsitingin hevur heitt á ráðgeva um at gera uppskot við kostnaðarmeting av at gera p-pláss á niðara partinum á matr. nr. 55-801f móti Varðagøtu við atliti til gerð av gongubreyt í vestaru síðu á Varðagøtu.

Víst verður eisini til j.nr. 2007-3445 – Gongubreyt í vestaru síðu á Varðagøtu á strekkinum Varðagøta 15 – Varðabú, sum var fyri í býráðnum 24. apríl 2008.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at farið verður undir samráðingar um keyp av lendi.

**Tekniska nevnd 8. mai 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti 29. sept. 2008:**
Í sambandið við samráðingarnar um møguligt keyp av lendi hevur løgdeildin biðið Kára Lamhauge, verkfr. um at virðismeta tann partin av matr. nr. 801f, Tórshavn, sum talan er um.

Metingin, sum er dagfest 5. september 2008, kemur fram til at hesin parturin av grundøkinum hevur eitt søluvirðið uppá kr. 900.000,- (sí 2007-2558/19). Í metingini er lagt til grund, at stykkið liggur í A1 øki, sum er ætlað til vanliga sethúsabygging. Metingin hevur ikki tikið virðið á bilhúsinum við, sum stendur á økinum.

Eigararnir av matr. nr. 801f, Tórshavn, eru ikki sinnaði at selja fyri kr. 900.000,-, tí tey meta ikki at tað er rætt, at tey ikki fáa nakað endurgjald fyri bilhúsið.

Sambært ætlanini hjá kommununi, skal ein álur av matr. nr. 801f, brúkast í sambandi við breiðkan og ger av gongubreyt á Varðagøtu og verður tá neyðugt at taka bilhúsini niður, orsakað av at tey annars koma at liggja úti á gongubreytini.

Um kommunan ikki vil keypa niðara part av matr. nr. 801f, men bert fer eftir álinum til breiðkan av Varðagøtu, so vil hon eisini verða áløgd at rinda endurgjald fyri bilhúsið. Talan er um eitt eldri bilhús, sum er kombinera bilhús við 2 smáum reiðskapsrúmum.

Eigararnir av matr. nr. 801f, Tórshavn hava sent kommununi uppskot um trý alternativ fyri at loysa málið:

1. *Kommunan yvirtekur 500 m2 av stykkinum til gongubreyt og parkeringsøkid fyri 1.050.000 kr*

2. *Kommunan gevur eigaranum loyvi at frámatrikulera 500 m2 av stykkinum, so hann kann selja tad sum grundøkid. Vid tí fótnotu at kommunan møguliga vil taka eina ál burtur av stykkinum til gongubreyt.*

3. *Kommunan ognartekur eina ál til gongubreyt, byggjur evt. eitt nýtt bilhús longri inni á stykkinum - ella ein avtala verður gjørd um hetta, og eigarin fær loyvid at frámatrikulerad 400 m2 til eitt grundstykki.*

Sambært punktið 1, ynskja eigararnir at fáa kr. 150.000,- meiri enn virðismetingin, og er hetta at meta sum endurgjald fyri bilhúsið. Sambært Kára Lamhauge, verkfr. er hendan upphæddin á góðari leið um gjaldast skal endurgjald fyri bilhúsið.

Ferðslumessiga er punkt 1 tað besta, tí við hesum fæst lendi til breiðkan av Varðagøtu, samstundis sum øki verður tøkt til at gera eini 15 parkeringspláss og útkoyringin frá p-plássinum verður við forsvarligum útsýni oman- og niðaneftir Varðagøtu.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og deildarleiðarin á løgdeildini mæla umvegis fíggjarnevndina býráðnum til, at Tórshavnar kommuna keypir niðara part (uml. 500m$^2$) av matr. nr. 801f, fyri kr. 1.050.000,-. Keypti parturin skal frábýtast, so at parturin til breiðkan av Varðagøtu verður lagdur út til veg, meðan restin fær egið matr. nr.

Viðvíkjandi atkomuvegnum (uml. 55 m$^2$) frá Varðagøtu til verandi hús á matr. nr. 801f, so verður hesin eisini at nýta sum innkoyring til parkeringsøki. Lendið verður yvirtikið av kommununi og matrikulera sum vegur. Øki verður yvirtikið uttan kostnað fyri kommununa, sum so rindar kostnaðin fyri at gera tað til atkomuveg til parkeringsøkið og sethúsini.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Samtykt at beina málið í teknisku nevnd.

**Tekniska nevnd 30. oktober 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 11. februar 2009:** Tikið av skrá.

- Tekniska nevnd skal taka støðu til um alternativa loysn, ið tekur støði í at kommunan ognar sær ein geira fram við markinum á Varðagøtu. Hetta er samsvar við langtíðar ætlan kommununar viðv. breiðkan av Varðagøtu og førir hetta sostatt við sær, at einki p-øki verður gjørt sambært omanfyri nevndu uppskotum. Henda loysn kemur at kosta um. 300.000,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 300.000,- av íløgum fyri vegir í 2009 (av framfluttari konto fyri Marknagilsvegin).

**Tekniska nevnd 16. februar 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2009:** Samtykt um byggi- og býarskipanarnevndina og teknisku nevndina at mæla býráðnum til at keypa 71 m² av matrikul nr. 801f til breiðkan av vestaru síðu av Varðagøtu og gerð av gongubreyt fyri mett virði, at veita endurgjald fyri bilhús sambært virðismeting og at loyva sundurbýti av ognini at fíggja sambært tilmæli frá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum til teknisku nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. februar 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at viðmæla frábýtið til gongubreyt v.m. framvið Varðagøtu, og at viðmæla sundurbýtið av restini av ognini í tvey grundstykkir sum frávik og at beina málið í býráðið.

**Býráðið 19. mars 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**78/09** **<u>2009-0543</u>**

**<u>Vinnumenningardeildin</u>**

**<u>Skipan av vinnumenning, tiltøkum, kunning, samskifti og marknaðarføring í Tórshavnar kommunu</u>**

Samskiftisdeildin, Vinnumenningardeildin og kunningarvirksemið verða løgd saman í eina deild. (navn má finnast). Deildin verður skipað í fýra geirar: Tiltøk, kunning, samskifti- og marknaðarføring og vinnumenning.

Deildin verður skipað sum projektorganisatión.



Arbeiðsuppgávurnar hjá eindini fevna um:

- Verða við til at skapa ein livandi bý
- Vinnumenning
- Vørumerking av Tórshavnar kommunu
- Samskipan og skipan av tiltøkum, sum heilt ella partvíst hoyra undir Tórshavnar kommunu
- Skapa karmar fyri tiltøkum, ið koma uttanífrá
- Menna ferðavinnu, cruise o.l
- Ferðavinnukunning og rakstur
- Samskipa messur o.l. har Tórshavnar kommuna luttekur
- Røkja heimasíðu og heimanet
- Íverksetan av samskiftispolitikki
- Gera kunningartilfar til borgaran og onnur vitjandi
- Marknaðarføring, tíðindi, lýsingar og kunngerðir

Verandi vinnumenningarleiðari verður deildarleiðari fyri deildini. Deildin vísir til kommunustjóran.

Við at leggja fleiri funktiónir saman, ber til at gagnnýta tilfeingið betur. Tað verður 1 deildarleiðari minni, samstundis sum tað í størri mun ber til at flyta tilfeingið frá einum virksemið til annað, og eisini fyribyrgja dupultfunktiónir. Tað mesta av virkseminum er frammanundan, og partvís óskipað.

Hetta uppskotið er lagt á einum støði, har sum tað ikki verður mett ráðiligt at skerja hetta meira. Alternativið til hetta er tí heldur, at lata verandi virksemið halda fram í verandi líki.
Sí annars frágreiðing í málinum og framløgu.

**Tilmæli**
Kommunustjórin, trivnaðarstjórin, miðfyrisitingarstjórin og deildarleiðarin fyri vinnumenning mæla til at skipa deild við omanfyristandandi uppgávum. Deildin verður sett saman av vinnumenningardeildini, samskiftisdeildini og ferðavinnukunning.

Mælt verður til at skipa/normera deildina við hesum fólkum:

- Deildarleiðari (deildarleiðarastarvið á Samskiftisdeildini), umnormerað til 35 lønarflokk sambært. Tænastumannafelagnum ella sambært avvarðandi sáttmála.
- Marknaðarføring og samskifti

- Samskiftisfólk (starvið kemur frá samskiftisdeildini) normerað upp til kandidatstøðið
- Grafikari (starvið frá samskiftisdeildini) normerað í 3. lønarflokkur samb. starvsmannafelagnum.
- Marknaðarfólk (nýtt starv) normerað upp til kandidatstøðið
- Teksthøvundur (nýtt starv, tó hevur hetta verið røkt av deildarleiðaranum fyri samskiftisdeildini; tað starvið dettur burtur) normerað upp til bachelorstøðið.

▪ Tiltøk

- Verkætlanarsamskipari (nýtt starv, tó hava projektansett starvsfólk røkt hesa uppgávu og starvið skal tí fíggjast av verandi játtanum til verkætlanir – normerað upp til kandidatstøðið. Hetta merkir, at eingin uppgáva verður løgd til hesa funktiónina, uttan at játtan til projektstýring fylgir við.

▪ Kunning

- Tvey fólk til kunningarvirksemið. Hesi hava ikki fyrr verið sett av Tórshavnar kommunu, tí mugu nýnormeringar til – normerað í ávíkavist í 2. og 4. lønarflokki í starvsmannafelagnum. Hesi størvini mugu í starvsmetingarnevndini, sum tekur endaliga støðu.

▪ Vinnumenning

- Tvey starvsfólk, normerað upp til ráðgeva 2 í BLF sáttmálanum. Deildin er í dag normerað við tveimum størvum og tað verður økið framvegis.

Í og við at fleiri funktiónir verða lagdar saman, verður fíggingin nakað fløkt í ár. Hetta verður greitt í sambandi við fíggjarætlanini fyri 2010, tó er í framløguni víst á, hvussu fíggingin fyri 2010 kann fáast til vega.

Í ár verður mælt til at fíggja deildina av konto 01, konto 39-3990 kr. 600.000 frá 2008 og kr. 600.000 frá 2009, konto 3490, kr. 200.000 frá konto 60-1945 og kr. 100.000 frá 60-5990.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2009:** Framlagt.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2009:** Útsett.

**Býráðið 19. mars 2009:** Tikið av skrá.

**79/09** **2008-4256**

**Útbúnaðurin á bátaøkinum við Skálatrøð og Kongabrúnna.**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**

Sum heild er útbúnaðurin, so sum teymar og grundketur o.a. í góðum standi, allar ketur og teymar verða kannaðar av kavara hvørt heyst, soleiðis at alt neyðugt viðlíkahaldsarbeiði er gjørt, áðrenn veturin kemur, eisini verður alt skrásett,

soleiðis at vit kunnu vita, nær neyðugt at skifta ketur og teymar út.

Men í Tórshavn við Skálatrøð og Kongabrúnna eru bátabummarnir til flótibrúgvarnar og el-skipanin í sera ringum standi.

Viðvíkjandi bátabummunum hava vit í dag tann trupulleika, at teir eru blivnir 26 ára gamlir, og eru sostatt farnir 1 ár útyvir ta livitíð, sum framleiðarin hevur sett á. Seinastu árini eru fleiri og fleiri bummar brotnir hvønn vetur, og seinasta vetur (2007) brotnaðu bummar nærum hvørja ferð illveður var. Brotnu bummarnir gera onkuntíð skaða uppá bátarnar sum liggja har. Hetta er ein óheppin støða, sum neyðugt er at gera nakað við. Tilsamans kosta nýggir bummar um 4 mió.

El-skipanin er 10 ára gomul og í ringum standi, nógvur peningur verður hvørt ár nýttur til at umvæla og skifta káplar, men hetta er alt bert lappaloysnir. Tilsamans kosta nýggj el-skipan um 2 milliónir krónur.

Sostatt standa útreiðslur uppá umleið 6 mió. fyri framman, sum ikki kunnu fíggjast um vanliga raksturin.

Um bátagjaldið verður hækkað fyri at fáa samlaða raksturin at javnviga, so kann peningur savnast til at fíggja hesar stóru høvuðsumvælingar frameftir, men størsti parturin av peninginum til nýggjar bummar og el-skipan má útvegast beinanvegin.

**Tilmæli**
Kommunustjórin og havnameistarin mæla til, at býráðið játtar 4 mió. til hesar høvuðsumvælingar, sum verða gjørdar yvir eitt 3 ára skeið.

Arbeitt verður við ætlan um loysn av restfíggingini.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá kommunustjóranum og havnameistaranum av konto 90.

**Býráðið 20. oktober 2008:** Samtykt við 6 atkvøðum fyri og 0 ímóti at taka undir við uppskotinum frá Elin Lindenskov um at beina málið í havnarnevndina.

Fyri atkvøddu: Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Beate L. Samuelsen og Jan Christiansen.

Greiddi ikki atkvøðu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Inga Dahl, Vagnur Johannesen, Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen.

**Havnarnevndin 17. november 2008:** Samtyktu at mæla býráðnum til at taka undir við fíggjarnevndini 8. oktober 2008.

**Fíggjarnevndin 19. november 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini.

**Býráðið 27. november 2008:** Einmælt samtykt.

**Bátabummar:**
Keyp av 179 nýggjum bummum hevur verið boðið út. Hetta merkir at allir bummarnir verða skiftir út.

Prísirnir fyri keyp av bummum liggja á umleið sama støði, men góðskan er eitt sindur ymisk. Tilsamans 4 veitarar í Danmark, Noreg og Svøríki hava bjóðað. Teir svensku veitararnir eru bíligast, og kemst hetta í stóran mun av, at kursurin er lágur í løtuni.

Tann bíligasti veitarin við tí bestu góðskuni er Nordiska Flytbryggor AB, sum í Føroyum verða umboðaðir av Tórshavnar Maskinverkstaði. Teir kunnu veita bummarnar fyri kr.2.300.000,- Mett verður at tað má brúkast nakað av hjálp uttanífrá tá bummarnir skulu skiftast, sum er mett at kosta kr. 250.000,-.

Tað er arbeiðskrevjandi at skifta bummarnar. Fyri at brúka somu fólkini, sum standa fyri dagliga rakstrinum av smábátaøkinum, at skifta útskifta bummarnar, kemur hettar arbeiðið helst at taka umleið 3 summør, men neyðugt er harumframt at fáa nakað av hjálp frá øðrum.

Av tí at tað nú er møguligt at keypa bummarnar bíliga, verður mælt til at keypa allar bummarnar nú.

| | |
|---|---|
| Kostnaður fyri bummar: | kr. 2.300.000,- |
| Kostnaður fyri eykahjálp til uppseting er kr. | kr. 250.000,- |
| Ymiskt tilfar og ókent | kr.. 300.000,- |
| Samlaður kostnaður: | kr. 2.850.000,- |

**El-veiting:**
Nýggj elveiting til bátarnar á Skálatrøð og á Kongabrúnni hevur verið boðin út millum LM-Electric og Install.

Mett út frá kostnaði og dygd, hevur LM- Elektric tað besta tilboðið.

Arbeiðið umfatar:
Nýggj høvuðsveiting til Skálatrøð
Legging av nýggjum kaðalum og uppseting av 49 standarum, við íalt 168 el-stykkum, sum kunnu víðkast við 24 stykkum.
Partvíst nýggj ljós á bátabrúgvunum
Gjaldsskipan, soleiðis at báteigararnir sjálvir avgreiða nýtslun um eina automat, sum verður uppsett í Vágsbotni.

Uppseting og veiting av elstandarum, ljósum og gjaldsautomat: kr. 1.325.000,-

| | |
|---|---|
| Høvuðsveiting: | kr. 125.000,- |
| Óvæntað: | kr. 150.000,- |
| Samlað | kr. 1.600.000,- |

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:**
At taka av tilboðnum frá Nordiska Flytbryggor AB fyri keyp av bummum.
At taka av tilboðnum frá LM-Elektric fyri uppseting av el.

At býráðið játtar tilsamans kr.4.450.000,- til arbeiðini.

**Havnarnevndin 15. mars 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og at beina málið víðari til býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini at fíggja av konto 90.

**Býráðið 19. mars 2009:** Einmælt samtykt.

**80/09** **2009-0718**

**Bátapláss á Gomlurætt.**

Havnin á Gomlurætt er ein landshavn, sum verður umsitin av Landsverk.

Umleið 9 bátar, sum í høvuðsheitum eru heimahoyrandi í Kirkjubø/Velbastað, hava ligið fyri teym á Gomlurætt, sum teir sjálvir hava lagt út og uttan góðkenning frá Landsverk.

Landsverk hevur givið boð til bæði teir bátarnar sum standa á landi, og teir sum liggja fyri teym, um at teir skulu flyta burtur.

Tað eru 20 bátar úr Kirkjubø/Velbastað/Norðadali, sum hava søkt um bátapláss, og sum standa á bíðilista.
Av teimum 20 bátunum, eru tað 5 bátar, sum nú liggja á Gomlurætt.
4 bátar, sum antin liggja við teym ella standa á landi, hava onga umsókn um bátapláss.

Sum ein fylgja av at bátarnir eru vístir burtur, hevur samskifti verið við Landsverk, hvat ein møgulig loysn kundi verið.

Úrslitið av samráðingunum við Landsverk eru m.a. at:
- Tórshavnar kommuna kann leggja flótibrúgvar út, so pláss er fyri umleið16 bátaplássum
- At 25 ára leigusáttmáli verður gjørdur
- At leigumálið eisini umfatar umleið 3.000 $m^2$ á landi.

- At Tórshavnar kommuna ger allar neyðugar íløgur og viðlíkahald
- At árliga leiguupphæddin, íroknað bátabrúnna til ferðafólkabátar, sum áður er løgd út, verður kr. 60.000,-

Inntøkurnar fyri útleigu av 16 bátaplássum er mettur til kr.32.000,- árliga

Íløgan í bátaplássini er lutfalsliga lítil, tí vit kunnu leggja bátabrúgvar í eina verðandi havn, men koma útreiðslurnar so ístaðin sum leigukostnaður til Landsverk.

Tað er stórur munur á flóð og fjøru á Gomlurætt, og tað ger tað kostnaðarmikið at gera ein fasta brúgv, og verður tað tí mett, at fragasta loysnin er at leggja flótibrúgvar út.

**Íløgukostnaður:**

| | | |
|---|---|---|
| Flótibrúgvar, landgongd, rekverk, skinnari | | 310.000,- |
| Útlegging og festir | 100.000,- | |
| Bátabummar 8 stk | 100.000,- | |
| Burturbeining av mola og vegur | 50.000,- | |
| Ljós, vatn og óvantað | 100.000 | |
| Samlaður íløgukostnaður | 660.000,- | |

Um økið á landið, sum liggur upp at bátaplássunum og er umleið 3.000 $m^2$ , skal brúkast til at seta bátar á, er neyðugt at planera, drena og asfaltera økið, og er tað tá mett at kosta kr.900.000,-.

Tað er Tórshavnar kommuna, sum fíggjar íløgur í bátahavnir meðan tað sambært kommunustýrisskipanini er Tórshavnar havn, sum stendur fyri rakstrinum av bátahavnum, sum skal hvíla í sær sjálvum.

**Tilmæli frá havnameistaranum:** Mælt verður til at taka undir við uppskotinum til leigusáttmála við Landsverk, og at leiguútreiðslurnar verða goldnar sum ein partur av íløgukostnaðinum til bátahavnir.

Eisini verður mælt til at játta kr. 660.000,- til íløgur í flótibrúgv við bummum, og at plássini verða, í fyrsta lagi, leiga til umsøkjarar úr Kirkjubø, Velbastað, Syðradali og Norðadali, eftir aldri á innkomnum umsóknum.

**Havnarnevndin 15. mars 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini at fíggja av konto 90.

**Býráðið 19. mars 2009:** Einmælt samtykt.

**81/09** **<u>2009-0719</u>**

**<u>Hækkan av bátagjøldum</u>**

Tá bátagjøldini vórðu hækkaði pr. 1. juli 2006, bleiv eisini samtykt at bátagjøldini skuldu endurskoðast um eitt át.

Síðani 2006 er kommunustýrisskipanin fyri Tórshavnar kommunu broytt, soleiðis at *"Roknskaparhaldið fyri vinnuhavnum og smábátahavnum skal haldast hvørt sær, og at loyvt er ikki at rinda møguligt hall av rakstri av smábátahavnum v.m. av inntøkum frá vinnuhavnum"*.

Í løtuni er tað nøkunlunda javnvág í roknskapinum fyri smábátarnar, men tá eru ongar stórar viðlíkahaldsuppgávur.

Undir stórar viðlíkahaldsuppgávur kemur skiftan av: Flótibrugvum, bummum, ketum sum halda flótibrúgvunum , grundketum til teymar og elskipan.
Fyri at smábátaøkið skal kunna leggja pening til síðis til nevndu stóru viðlíkahaldsuppgávur, skal gjaldið í miðal hækka umleið 30%.

Um gjaldið ikki verður hækkað, verður neyðugt at biðja um ískoyti til raksturin, tá tey stóru viðlíkahaldsarbeiðini skulu gerast.

Verðandi inntøkur fyri legugjald 1.260.000,-
Eftir hækking av bátagjøldunum við 30% er inntøkan: 1.638.000,-

Tað eru bæði bátabummar og báteteymar. Bátabummarnir eru nakað dýrari í viðlíkahaldi, umframt at tað er høgligari at liggja við ein bátabumm, heldur enn við teym. Rættast er tí at hava ein prísmun.
Teir størru bátarnir, sum liggja við bátabummarnar, skulu hava lutfalsliga stórar bummar, sum ofta fáa skaða, tí bátarnir taka nógvan vind á seg. Tí er uppskot um, at teir hækka lutfalsliga meira enn teir smærru.

Fyri at sleppa undan at hækka/lækka gjaldið aftur, verður mælt til at gjaldið verður prístalsregulerað árliga.

**Tilmæli frá havnameistaranum**: Mælt verður til at hækka bátagjaldið við í miðal 30%, at koma í gildið pr 1. juli 2009, og at tað verður prístalsregulerað árliga.

At legugjaldið fyri bátapláss við **bummum** hækkar soleiðis:

| **Prísbólkur** | **Breidd** | **Hækking Í %** | **Verðandi árliga gjald** | **Nýtt gjald** |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 0-199 | 35 | 875 | 1.081 |
| 2 | 200-229 | 35 | 1.562 | 2.109 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 3 | 230-259 | 35 | 2.250 | 3.037 |
| 4 | 260-289 | 35 | 2.937 | 3.965 |
| 5 | 290-319 | 37,5 | 3.625 | 4.984 |
| 6 | 320-349 | 40 | 4.312 | 6.037 |
| 7 | 350-389 | 42,5 | 5.000 | 7.125 |
| 8 | 389- | 45 | 5.687 | 8.247 |

Legugjald fyri bátapláss við **teymar og bryggjur** hækkar soleiðis

| **Prísbólkur** | **Breidd** | **Hækking Í %** | **Verðandi árliga gjald** | **Nýtt gjald** |
|---|---|---|---|---|
| 1 | 0-199 | 25 | 875 | 1.074 |
| 2 | 200-229 | 25 | 1.562 | 1.953 |
| 3 | 230-259 | 25 | 2.250 | 2.812 |
| 4 | 260-289 | 25 | 2.937 | 3.672 |
| 5 | 290-319 | 25 | 3.625 | 4.531 |
| 6 | 320-349 | 25 | 4.312 | 5.390 |
| 7 | 350-389 | 25 | 5.000 | 6.250 |
| 8 | 389- | 25 | 5.687 | 7.109 |

**Havnarnevndin 15. mars 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2009:** Ein meiriluti: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov og Marin Katrina Frýdal mæla býráðnum til at taka undir við havnarnevndini.

**Ein minniluti:** Sjúrður Olsen tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðið 19. mars 2009:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, við tí ískoyti, at í hækkingina er íroknað kjølsvín til hvønn bát einaferð um árið, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Kathrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Maria Hammer Olsen og Vagnur Johannesen.

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

**82/09** **2009-0620**

**Framleingjan av busssáttmálum við MB-Bussar og Sp/f Gundurs Bussar fram til 1. juli 2010**

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
Busssáttmálarnir, sum Tórshavnar kommuna hevur við MB-Bussar og Sp/f Gundurs Bussar, ganga út 1. februar 2010, og sáttmálin, sum kommunan hevur við fa. Bussferðir, gongur út tann 1. juli. 2010.

Ì sambandi við at bussleiðin skal útbjóðast av nýggjum, verður heitt á teknisku nevnd um at núverandi sáttmálar, við MB-Bussar og Sp/f Gundurs Bussar, verða framlongdir til 1. juli. 2010, so at allir sáttmálarnir halda uppat samstundis. Ætlanin er, at allar bussleiðirnar, sum eru í Tórshavnar kommunu, skulu útbjóðast samstundis. Roknast kann eisini við, at tað skuldi givið eina effikitivisering av bussleiðini, um alt verður bjóðað út í einum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at framleingja teir sáttmálar, sum eru við ávíkavist við MB-Bussar og Sp/f Gundurs Bussar fram til 1. juli 2010.

**Tekniska nevnd 5. mars 2009:** Nendin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 19. mars 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**83/09** **2008-3983**

**Uppskot til ársfíggjarætlan 2009 hjá Tórshavnar kommunu.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Býráðið hevur 11. september 2008, sambært kommunustýrisskipanini, framlagt karm til ársfíggjarætlan fyri 2009, ið javnvigar við tkr. 617.692.

Umsitingin hevur gjørt uppskot til fíggjarætlan fyri árið 2009, við støði í samtyktunum hjá faknevndunum, og javnvigar uppskotið nú við 1. viðgerð við tkr. 656.892. Munurin tkr. 39.200 kemst av framfluttum íløgum.

**1. viðgerð:**

**Útreiðslur:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Konto | 01 | Miðfyrisitingin | kr. | 24.226 |
| - | 02 | Trivnaðarfyrisitingin | - | 9.172 |
| - | 03 | Tekniska fyrisitingin | - | 19.648 |
| - | 04 | Kt-deildin | - | 6.077 |
| | | **Fyrisiting íalt** | **kr.** | **59.123** |
| | | | | |
| Konto | 11 | Vegir, gøtur, kloakkir o.a. | kr. | 18.273 |
| - | 12 | Umhvørvismál | - | 1.600 |
| - | 14 | Vatnveiting og gøtuljós | - | 13547 |
| - | 15 | Renovatión | - | 19.238 |
| - | 16 | Asfalt, ferðsla og reinhald | - | 19.300 |
| - | 18 | Bussleiðin | - | 19.341 |
| - | 19 | Sløkkiliðið/verkstaðið | - | 10.152 |
| - | 38 | Fríðkan av býnum og kirkjugarðar | - | 12.199 |
| | | **Tekniska veitingar íalt** | **kr.** | **113.650** |
| | | | | |
| Konto | 20 | Skúlin í Hesti | kr. | 50 |
| | 21 | Nólsoyar skúli | - | 560 |
| | 22 | Velbastaðar skúli | - | 844 |
| | 23 | Kaldbaks skúli | - | 416 |
| | 24 | Kollafjarðar skúli | - | 2.678 |
| - | 241 | Ítróttarhøllin í Kollafirði | - | 500 |
| - | 25 | Tórshavnar kommunuskúli | - | 4.527 |
| - | 26 | Venjingarskúlin | - | 4.085 |
| - | 27 | Eysturskúlin | - | 4.396 |
| - | 28 | Sankta Frans skúli | - | 3.316 |
| - | 29 | Hoyvíkar skúli | - | 3.463 |
| - | 291 | Hoyvíkshøllin | - | 475 |
| - | 30 | Argja skúli | - | 3.612 |
| - | 31 | Kvøld-, ungdóms- og listaskúli | - | 4.128 |
| | 310 | Skúlin við Løgmannabreyt | - | 2.682 |
| - | 32 | Tórshavnar musikkskúli | - | 6.825 |
| - | 33 | Felags skúlamál | - | 4.457 |
| | | **Skúlamál íalt** | **kr.** | **47.014** |
| | | | | |
| Konto | 34 | Tórshavnar býarsavn | kr. | 601 |
| - | 35 | Býarbókasavnið | - | 6.839 |
| - | 36 | Svimjihøllin | - | 5.743 |
| - | 37 | Stadion | - | 4.051 |
| - | 39 | Ymsir studningar | - | 11.860 |
| - | 64 | Stuðul til feløg o.o. | - | 3.022 |
| | | **Mentan og frítíð íalt** | **kr.** | **32.116** |
| | | | | |
| konto | 40 | Barnavernd - eldrarøkt o.a. | kr. | 19.457 |
| - | 41 | Lækna- og heilsumál | - | 4.510 |
| - | 411 | Serflutningsskipanin | - | 395 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| - | 42 | Tannlæknastovan | - | 10.300 |
| - | 43 | Ellis- og umlættingarheimið | - | 0 |
| - | 431 | Sambýlið í Hoydølum | - | 670 |
| - | 432 | Tjarnargarður | - | 0 |
| - | 433 | Heimið í Vallalíð | | 0 |
| - | 434 | Sambýlið í Kollafirði | - | 590 |
| - | 435 | Sambýlið í Mattalág | - | 670 |
| - | 44 | Tilhaldið í Tórsgøtu | - | 0 |
| - | 441 | Dagtilhaldið í Nólsoy | - | 0 |
| | | **Almanna og heilsumál íalt** | **kr.** | **36.592** |
| | | | | |
| konto | 45 | Kommunala dagrøktin | kr. | 6.310 |
| - | 46 | Miðstovnurin í Gundadali | - | 1.760 |
| - | 47 | Dagstovnurin Lítliskógur | - | 5.062 |
| - | 48 | Býlingshúsið á Norðasta Horni | - | 2.531 |
| - | 49 | Býlingshúsið á Ternuryggi | - | 2.578 |
| - | 50 | Býlingshúsið undir Fjalli | - | 2.721 |
| - | 51 | Býlingshúsið millum Gilja | - | 2.702 |
| - | 52 | Býlingshúsið undir Brúnni | - | 2.626 |
| - | 53 | Býlingshúsið Vesturi á Flat | - | 2.816 |
| - | 54 | Býlingshúsið Inni á Gøtu | - | 2.911 |
| - | 560 | Dagstovnurin í Hoyvík | - | 4.757 |
| - | 561 | Dagstovnurin við Løgmannabreyt | - | 3.539 |
| - | 562 | Dagstovnurin Millum Bóla | - | 1.808 |
| - | 563 | Dagstovnurin við Landavegin | - | 3.977 |
| - | 564 | Stella Maris vøggustova | - | 3.197 |
| - | 565 | Dagstovnurin Sólareygað | - | 4.243 |
| - | 566 | Dagstovnurin í Løkjutúni | - | 3.826 |
| - | 567 | Barnagarðurin við Velbastaðvegin | - | 6.546 |
| - | 568 | Barnagarðurin á Velbastað | - | 3.289 |
| - | 569 | Dagstovnurin Látrið | - | 1.231 |
| - | 572 | FTS í Hornabø | - | 1.653 |
| - | 573 | FTS Smílibýlið | - | 1.378 |
| - | 574 | FTS Blóma | - | 2.287 |
| - | 575 | FTS í Badmintonhøllini | - | 1.763 |
| - | 579 | FTS í Hoyvík | - | 1.984 |
| - | 58 | Dagstovnurin í Øksnagerði | - | 3.292 |
| - | 582 | Dagstovnurin Birkilund | - | 6.137 |
| - | 583 | Dagstovnurin Flatnagarður | - | 1.214 |
| - | 584 | Býlingshúsið í Maritugøtu | - | 2.578 |
| - | 585 | Dagstovnurin Kurl@ | - | 1.931 |
| - | 587 | Dagstovnurin við Botnánna | - | 1.490 |
| - | 589 | Dagstovnurin á Hamrinum | - | 3.730 |
| - | 588 | Margarinfabrikkin | - | 2.581 |
| - | 59 | Sjálvsognarstovnar o.a. | - | 14.348 |
| | 599 | Barna- og ungdómsdeildin | - | 24.170 |
| | | **Barnaansing íalt** | **kr.** | **138.966** |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Konto | 60 | Ymsar aðrar útreiðslur | kr. | 11.210 |
| - | 82 | Umsiting av bygningum | - | 42.335 |
| | 63 | Útveganir | - | 5.000 |
| | 68 | Útskiftan av amboðum | - | 7.000 |
| | 69 | Nýútvegan av amboðum | - | 3.000 |
| | | **Aðrar útreiðslur íalt** | **kr.** | **68.545** |
| **Konto** | **66** | **Reguleringskonto** | **kr.** | **2.500** |
| | | **Rakstararútreiðslur íalt** | **kr.** | **498.506** |
| Konto | 90 | Íløgur | kr. | 145.200 |
| | Smábátahavn | | - | 4.000 |
| | | **Rakstur og íløgur íalt** | **kr.** | **647.706** |
| Konto | 61 | Rentuútreiðslur | kr. | 7.236 |
| - | 62 | Avdráttir av lánum | - | 1.950 |
| | **Lánsgjøld** | | **kr.** | **9.186** |
| | | **Útreiðslur íalt** | **kr.** | **656.892** |

**Inntøkur:**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Konto | 80 | Rentuinntøkur | kr. | 3.000 |
| - | 83 | Inntøkur av traðum og økjum | - | 3.000 |
| - | 85 | Aðrar inntøkur og útreiðslur | - | 0 |
| - | 89 | Skattainntøka | - | 598.796 |
| | At fíggja v. tøkum/framfluttur peningi | | - | 52.096 |
| | **Inntøkur íalt** | | **kr.** | **656.892** |

**Íløgur:**

| | | |
|---|---|---|
| Glyvursvegur 1-4. stig | kr. | 5.000 |
| Kloakkir | - | 10.000 |
| Renovatión | - | 2.200 |
| Kirkjugarðar | - | 2.000 |
| Fríðkan av býnum | - | 2.500 |
| Ítróttur og frítíðarvirksemi | - | 29.500 |
| Barnaansing | - | 2.000 |
| Skúlar og mentan | - | 87.000 |
| Eldraøkið | - | 5.000 |
| Smábátahavnir | - | 4.000 |

**Tilsamans** **kr. 149.200**

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. oktober 2008:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Elin Lindenskov og Leivur Hansen samtyktu at taka undir við uppskotinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

Ein minniluti: Jan Christiansen og Sjúrður Olsen taka støðu seinni.

Byggi- og býarskipanarnevndin umsitur konto 38 og 82.

**Sosiala nevnd 2. oktober 2008:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at taka undir við uppskotinum.

Sosiala nevnd umsitur konto 40, 41, 411, 42, 43, 431, 432, 433, 434, 435, 44 og 441.

**Brunanevndin 2. oktober 2008:** Samtykt at fíggjarætlanin verður kr. 10.152 mió.

Málið fer í fíggjarnevndina.

Konto 68 Útskiftan av amboðum – vísir nevndin á, at kommunan eigur amboð o.a. fyri kr. 100 mió. og tí verður mælt til at seta meira enn 6 mió. av í 2009.

Brunanevndin umsitur konto 19 og viðmælur konto 68, sum fíggjarnevndin umsitur.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 2. oktober 2008:** Ein minniluti, Elin Lindenskov og Marin Katrina Frýdal, samtykti at beina málið í fíggjarnevndina við eini samlaðari upphædd til veitingar innan umhvørvi áljóðandi tkr. 20.838. Ein annar minniluti, Jan Christiansen og Beate L. Samuelsen tekur støðu á einum seinni fundi.

Heilsu- og umhvørvisnevndin umsitur konto 12 og 15.

**Mentamálanevndin 6. oktober 2008:** Ein meiriluti, Hildur Eyðunsdóttir, Jógvan Arge og Halla Samuelsen, mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at taka undir við uppskotinum.

Ein minniluti, Beate L. Samuelsen og Inga Dahl, taka støðu á býráðsfundi.

Mentamálanevndin umsitur konto 20, 21, 22, 23, 24, 241, 25, 26, 27, 28, 29, 291, 30, 31, 310, 32, 33, 34, 35, 36, 37, 39 og 64.

Eisini umsitur mentamálanevndin hesar kontoir 45, 46, 47, 48, 49, 50, 51, 52, 53, 54, 560, 561, 562, 563, 564, 565, 566, 567, 568, 569, 572, 573, 574, 575, 579, 58, 582, 583, 584, 585, 587, 589, 588, 59 og 599.

**Tekniska nevnd 7. oktober 2008:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen og Leivur Hansen, samtykti at taka undir við ársfíggjarætlanini álj. tkr. 70.401 og at beina málið í fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, tekur støðu á seinni fundi.

Tekniska nevndin mælir harumframt til at avsettar verða á konto 60-3500 hátíðarhald, flagging o.a. tkr. 940, 60-7170 inntøkur av parkeringsskipanini tkr. 2.500 og 60-6171 útreiðslur av parkeringsskipanini tkr. 1.500.

Tekniska nevndin umsitur konto 11, 14, 16 og 18.

**Fíggjarnevndin 8. oktober 2008:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Leivur Hansen mælir býráðnum til at samtykkja uppskotið til ársfíggjarætlan og íløguætlan 2009 við 1. viðgerð.

Ein minniluti, Jan Christiansen og Høgni Mikkelsen, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðið 20. oktober 2008:** Samtykt við 7 atkvøðum fyri og 0 ímóti at samtykkja uppskotið til ársfíggjarætlan og íløguætlan 2009 við 1. viðgerð. Fyri atkvøddu Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, , Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov.
Greiddu ikki atkvøðu Jan Christiansen , Høgni Mikkelsen, Sjúrður Olsen, Beate L. Samuelsen, Vagnur Johannesen og Inga Dahl.

Jan Christiansen boðaði frá, at minnilutin kemur við broytingaruppskoti til 2. viðgerð.

**2. viðgerð**

**Fíggjarnevndin 25. november 2008:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Leivur Hansen mælir við 2. viðgerð býráðnum til at góðkenna uppskotið til ársfíggjarætlan og íløguætlan 2009.

Tó hevur Leivur Hansen viðmerking um, at hann ikki tekur fult undir við sundurliðingini av íløgunum.

Ein minniluti: Jan Christiansen tekur støðu á býráðsfundi.

Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Leivur Hansen samtykti eisini at mæla býráðnum til, at áseta skattaprosentið til 19,75 og barnafrádráttin til kr. 5.500.

Ein minniluti: Jan Christiansen tekur støðu á býráðsfundi.

**Býráðið 27. november 2008:** Áðrenn atkvøðugreiðsluna gjørdi Jan Christiansen vart við, at minnilutin tekur undir við uppskotinum til fíggjarætlan og tekur undir við viðmerkingunum hjá Leivur Hansen.

Einmælt samtykt.

Endurskoðaði íløgukarmurin fyri árið 2009 er sum hjálagt.

**Ískoyti:**

| **Bólkur** | |
|---|---|
| | **2009** |
| **Vegir** | 22.000 |
| **Kloakkir** | 7.350 |
| **Renovation** | 5.700 |
| **Kirkjugarðar** | 800 |
| **Fríðkan av býnum** | 3.500 |
| **Ítr. og frítíðarv.** | 49.000 |
| **Barnaansing** | 1.000 |
| **Skúlar og mentan** | 113.500 |
| **Eldraøkið** | 3.500 |
| **Smábátahavnir** | 0 |
| **Annað** | |
| | **206.350** |

Stjórnin mælir til at broyta fíggjarætlanina samsvarandi:

Hækking av íløgum tkr. 57.150

Hækking av fígging við lántøku tkr. 57.150

Soleiðis at samlaða fíggjarætlanin javnvigar við tkr. 714.042.

**3. viðgerð**
**Fíggjarnevndin 16. mars 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá stjórnini har samlaða fíggjarætlanin javnvigar við tkr. 714.042

**Býráðið 19. mars 2009:** Atkvøtt var um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Kathrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Maria Hammer Olsen, Anfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen.

84/09 2009-0416

**Lántøka**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
**Fíggjarnevndin 11. februar 2009:** Tikið av skrá.

Íløgukarmurin fyri árið 2009 er sum hjálagt.

**Bólkur**

| | 2009 |
|---|---|
| **Vegir** | 22.000 |
| **Kloakkir** | 7.350 |
| **Renovation** | 5.700 |
| **Kirkjugarðar** | 800 |
| **Fríðkan av býnum** | 3.500 |
| **Ítr. og frítíðarv.** | 49.000 |
| **Barnaansing** | 1.000 |
| **Skúlar og mentan** | 113.500 |
| **Eldraøkið** | 3.500 |
| **Smábátahavnir** | 0 |
| **Annað** | |
| | **206.350** |

Tann samlaði íløgurkarmurin fyri 2009 verður kr. 206.350. Av hesum er neyðugt at lánifíggja kr. 107 mió. í árinum.

Harafturat er neyðugt at taka lán til samtyktar íløgur frá 2008 kr. 63 mió. í staðin fyri tær 100 mió. kr., sum eru samtyktar í fíggjarætlanini fyri 2008. Tann samlaði lánitørvurin fyri 2008 og 2009 verður sostatt kr. 170 mió. Lánið verður goldið aftur yvir 10 ár. Hetta merkir, at lánini er afturgoldið í 2020.

Karmarnir fyri ætlaðar íløgur í 2010, 2011 og 2012 eru:

**Bólkur**

| | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|
| **Tekniska nevnd** | 14.000 | 15.000 | 56.000 |
| **Byggi- og býarsk.nevnd (fríðkan av býnum)** | 3.000 | 3.000 | 3.000 |
| **Mentamálanevndin** | 107.500 | 50.000 | 29.500 |
| **Sosiala nevnd** | 3.000 | 10.000 | 9.500 |
| **Fíggjarnevndin (smábátahavnir)** | 0 | 5.000 | 5.000 |
| | **127.500** | **83.000** | **103.000** |

Íløgukarmurin 2010–2012 merkir, at Tórshavnar kommuna væntandi má taka kr. 30 mió. afturat í láni í 2010. Lánið við ársenda 2012 verður væntandi um kr. 200 mió.

Harafturat er neyðugt at lána til gerð av sethúsagrundum og vinnustykkjum til sølu.

**Tilmæli:**
Stjórarnir mæla til at lána 150 mió. kr. til íløgur.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum, vísandi til frágreiðingina í málinum.

**Býráðið 19. februar 2009:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Kathrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Vagnur Johannesen og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Annfinn Brekkstein og Jan Christiansen.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2009:** Útsett til eyka fíggjarnevndarfund hósdagin 19. mars 2009 kl. 15.00.

**Fíggjarnevndin 19. mars 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka av tilboðnum frá Føroya Lívstrygging uppá lán 150 mió. kr. at gjalda aftur yvir 10 ár.

**Býráðið 19. mars 2009:** Akvøtt varð um um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Kathrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Maria Hammer Olsen, Anfinn Brekkstein, Vagnur Johannesen og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen

**85/09** **2005-2344 (sí eisini j. nr 2008-3134 )**

**Dispositiónsuppskot: Rundkoyring á vegamótinum Blómubrekka-Sunds-vegur-Óluvugøta**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**

Umsitingin hevur latið gjørt 6 ymisk uppskot til rundkoyring á vegamótinum Blómubrekka-Sundsvegur-Óluvugøta.

Ráðgevandi verkfrøðingurin í málinum p/f Verkfrøðingastovan mælir umsitingini til at arbeiða víðari við uppskoti nr. 4. Víst verður til skjal 2005-2344/1. Ì hesum uppskotinum verður ikki neyðugt hjá Tórshavnar kommunu at ogna sær lendi frá grannaognunum, sum eru ognirnar hjá ávikavist Annu Asbjarnardóttir, matr. nr. 1466, Tórshavn, og Sólbjørg Petersen, matr. nr. 1470u, Tórshavn.

Atlit eru eisini gjørd til ferðsluteljingar í økinum og eisini til ferðslumodellið hjá Rambøll Nyvig as, sum framskrivar ferðslumynstrið í Tórshavn fram til 2022. Tó er hædd ikki tikin fyri føstum sambandi millum Tórshavn-Toftir-Strendur.

Umsitingin hevur sett seg í samband við “Dansk Vejdirektoriat” um at projekt-granska fyriliggjandi uppskot við fyrispurningi um fyrimunir og vansar. Eisini eru “Dansk Vejdirektoriat” bidnir um at koma við alternativum uppskoti til loysn, sí skjal nr. 2005-2344/2.

Greitt verður frá niðurstøðuni, sum verður framløgd á fundinum.

**Fíggjarviðurskifti:**
Umsitingin hevur latið gjørt eina kostnaðarmeting í sambandi við uppskot nr. 4, sí mál nr. 2005-2352/1, og eina samlaða kostnaðarmeting íroknað ráðgeving, eftir-liti, umsiting, óvæntaðum útreiðslum og mvg, sí sak nr. 2005-2352/2.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin kemur við tilmæli á fundinum.

**Tekniska nevnd 22. september 2005:** Ein meirluti, Katrin Dahl Jakobsen, Leivur Hansen og Marin Katrina Frýdal, samtykti at umsitingin arbeiðir víðari við uppskotinum frá Vejdirektoratet.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen, mælir til at útseta málið, til aðrar samtyktir í nevndini eru framdar í verki.

Ein annar minniluti, Sjúrður Olsen, mælir til at taka undir við uppskoti nr. 4 frá sp/f Verkfrøðingastovuni.

**Ískoyti:**
Nevndarlimur hevur ynskt málið á skrá. Umsitingin greiðir frá málinum.

**Tekniska nevnd, 7. september 2006:** Nevndin samtykti at heita á umsitingina um at gera uppskot til rundkoyring við støði í samtykt frá 22. september 2005, ið nervar grannaognirnar minst møguligt at leggja fyri nevndina aftur skjótast gjørligt.

**Ískoyti:**

Umsitingin hevur gjørt fýra nýggj uppskot til rundkoyring á vegamótinum Blómubrekka-Sundsvegur-Óluvugøta, sí j. nr. 2005-2344/9.

Umsitingin er komin til ta niðurstøðu, at óansæð um rundkoyringin verður flutt norður- og eystureftir, so koma vit so langt inn á økið hjá Onnu Asbjarnadóttir, at nærum helmingurin av ognini verður løgd undir veg.

Eisini skal havast í huga, at um rundkoyringin verður flutt, so mugu innkoyringar-vegirnir frá Blómubrekku og Óluvugøta broytast munandi. Hetta hevur stórar økonomiskar avleiðingar við sær.

Umsitingin metir tað ikki vera rætt tekniskt at flyta rundkoyringina í mun til samtyktina 22. september 2005.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at hildið verður fast um uppskotið til rundkoyring, sí j. nr. 2005-2344/8. Mælt verður til at játta kr. 500.000,00 til projektering og eftirlit og biðja Verkfrøðingastovuna standa fyri hesum.

**Tekniska nevnd, 5. oktober 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við uppruna-uppskotinum j.nr. 2005-2344/12 og at mæla umsitingini til at fara undir samráðingar við eigaran á matr. nr. 1466, Tórshavn, um keyp av ognini.

**Tilmæli:**
Vísandi til at játtan fyri projektering og arbeiði ikki er avsett í fíggjarætlanini fyri 2007 mæla tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til at útseta arbeiði við projektering, men at arbeitt verður víðari við samráðingum við eigaran at ogna sær lendi.

**Fíggjarnevndin 6. desember 2006:** Samtykt at taka upp samráðingar um at kommunan ognar sær lendið.

- Formaðurin i teknisku nevnd ynskir at viðgera málið í nevndini.

**Tekniska nevnd 27. september 2007:** Nevndin samtykti at skunda undir at samtyktin hjá fíggjarnevndini frá 6. desember 2006 verður framd og at beina málið aftur í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 3. oktober 2007:** Samtykt at taka stig til at loysa málið sum skjótast.

- Nú peningur er settur av til verkætlanina á íløguætlanini fyri 2008, skal tekniska nevndin taka støðu til um farast skal undir fyriliggjandi uppskot og síðani mæla fíggjarnevndini til at játta pening til verkætlanina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin koma við tilmæli til fundin.

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játtaðar verða kr. 500.000,- til prosjektering og eftirlit av rundkoyring sambært j. nr. 2005-2344/12 og at arbeiðið verður latið ráðgevandi fyritøku at fremja beinan vegin.

**Tekniska nevnd 17. januar 2008:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og at játta kr. 500.000,- av íløgum.

**Býráðið 31. januar 2008:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

Umsitingin kunnar um status í málinum.

**Tekniska nevnd 8. mai 2008:** Kunnað varð um málið.

**Tilmæli frá løgdeildini:**
Í sambandi við gerð av rundkoyring á vegamótinum Blómubrekka – Sundsvegur – Óluvugøta verður neyðugt hjá kommununi at ogna sær uml. 334 fermetrar av matr. nr. 1466, Tórshavn. Eigari av matr. nr. 1466 er Anna Asbjarnardóttir.

Orsakað av skapinum av matr. nr. 1466 og staðsetingini av húsunum á ognini, kemur rundkoyringin at liggja undir 1 metur frá sjálvum húsinum, og kemur at verða til stóran ampa fyri stykkið.

Í hesum sambandi hevur umsitingin hjá kommununi veri í sambandi við Onnu Asbjarnardóttir fyri at finna eina loysn á málinum. Aftaná fund við Onnu Asbjarnardóttir í desember 2007 sendi kommunan henni eitt skriv við 3 uppskotum til loysn á málinum:

1. *Kommunan keypir hús tygara fyri marknaðarvirðið og útvegar tygum annað kommunalt grundstykki, at byggja nýggj hús á. Grundstykki skulu tygum rinda kostprís fyri. Í tíðarskeiðinum, frá at kommunan hevur keypt tygara hús, til nýggju húsini eru liðug og klár at flyta inn í, kunnu tygum verða búgvandi í núverandi húsum.*

2. *Tygum verða búgvandi í húsum tygara, eisini aftaná at rundkoyringin er gjørd. Kommunan rindar tygum so fyri virðislækkingina av ognini, sum stendst av rundkoyringini.*

3. *Kommunan keypir hús tygara fyri marknaðarvirði og tygum nýta peningin at keypa onnur hús fyri. Í tíðarskeiðnum, frá at kommunan hevur keypt tygara hús, til tygum hava funnið onnur hóskandi hús, kunnu tygum verða búgvandi í núverandi húsunum.*

Aftaná fleiri telefonsamrøður og fundir har Anna Asbjarnardóttir møtti saman við Bjørn á Heygum, adv. komu tey við hesum uppskotið til semju:

1. *Partarnir velja ein serkønan óvildugan metingarmann til at virðismeta samlaðu ognina 1466 við ástandandi sethúsum til galdandi handilsvirðið.*

2. *Tá virðismetingin er gjørd, yvirtekur Tórshavnar kommuna eitt umleið 334 m² stórt øki burturav ognini matr. nr. 1466, Tórshavn, til rundkoyring og gongubreyt. Nevnda lendi verður samsvarandi hesum skeytað og avhendað til Tórshavnar kommunu samb. tær í hesum sáttmála galdandi treytir.*

3. *Arbeiðið við at gera rundkoyring skal vera til minst møguligan ampa fyri eigaran av matr. nr. 1466, og skal taka atlit til, at atkomumøguleikarnir verða skerdir minst møguligt.*

4. *Tórshavnar kommuna ger ein ljóðmúr millum rundkoyringina og matr. nr. 1466, Tórshavn, sum verjir ognina móti óljóði og óviðkomandi ferðslu á økinum.*

5. *Tórshavnar kommuna flytur steinin, sum stendur á yvirtikna økinum yvir á eftirverandi stykki á ognini matr. nr. 1466 eftir ávísing eigarans.*

6. *Tórshavnar kommuna syrgir fyri, at ognin matr. nr. 1466, Tórshavn framhaldandi hevur vegaatgongd, soleiðis at bilar kunnu koyra inn til ognina og parkera uttanfyri.*

7. *Tá rundkoyringin er liðug, verður ein nýggj virðismeting gjørd av írestandi ognini við ástandandi sethúsum til galdandi handilsvirðið.*

8. *Endurgjaldið fyri yvirtikna lendi verður roknað sum munurin millum fyrru og seinnu virðismetingina og verða at gjalda eigaranum av matr. nr. 1466, Tórshavn, kontant í seinasta lagið 14 dagar eftir at seinna virðismetingin er gjørd. Verður ikki goldið rættstundis skal Tórshavnar kommuna gjalda 9% í rentu p.a. av tí til eina og hvørja tíð verandi restskuld.*

9. *Eigarin av ognini matr. nr. 1466, Tórshavn, fær í eitt tvey ára skeið eftir seinnu virðismetingina møguleika fyri at velja antin hann vil varðveita írestandi ognina við ástandandi sethúsum ella, at kommunan skal yvirtaka ognina fyri metingarvirðið.*

10. *Velur eigarin at avhenda ognina til Tórshavnar kommunu, skal hann boða kommununi skrivliga frá hesum innan ásetta tvey ára skeiðið er runnið. Tórshavnar kommuna hevur tá skyldu til at yvirtaka ognina móti at gjalda ásetta prísin sambært seinnu virðismetingina. Keypspeningurin skal gjaldast í seinasta lagi 14 dagar eftir at skeyti er tinglýst í navninum hjá Tórshavnar kommunu uttan prejudicerandi rættarviðmerkingar. Verður ikki goldið*

*rættstundis skal Tórshavnar kommuna gjalda 9% í rentu p.a. av tí til eina og hvørja tíð verandi restskuld.*

Við einum seinni skrivi hevur Bjørn á Heygum, adv. gjørt vart við at eigarin ynskti at broyta uppskotið nakað:

*"Eigarin hevur nú gjørt vart við, at hann ynskir eina loysn, har tað undir einum verður gjørd ein virðismeting av samlaðu ognini og umframt frábýtta lendinum á ca. 334 m², sum verður tikið burturav til rundkoyring.*

*Miðað verður sostatt ímóti at fáa eina virðismeting av yvirtikna lendinum beinanvegin, soleiðis at endurgjaldið fyri hendan partin av ognini kann gjaldast eigarunum uttan at bíða til samlaða arbeiðið er liðugt.*

*Hildið verður at hetta er bæði rímiligt og nátúrligt, tá endurgjald vanliga verður latið samstundis við, at jørð verður avhendað til nýggjan eigara"*

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini mælir til, at taka av uppskotinum til semju frá eigaranum, tó soleiðis at tíðarskeiðið í pkt. 9 verður eitt ár í staðin fyri tvey ár.

**Fíggjarnevndin 21. mai 2008:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 11. februar 2009:** Tikið av skrá.

- Fyri at fáa fatur á lendinum til ætlaðu rundkoyring er neyðugt at fáa fíggingina tøka skjótast gjørligt.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at heita á býráðið, um fíggjarnevndina, at játta kr. 265.000,- av íløgum fyri vegir í 2009 (av konto fyri Marknagilsvegin) og at játta kr. 385.000,- av játtan til dagføring av Sundsvegnum smb j. nr. 2008-1294.

**Tekniska nevnd 16. februar 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 19. februar 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti 4. mars 2009:**
Aftaná at hava fingið málið til avgreiðslu, hevur leiðarin á løgdeildini gjørt vart við, at kostnaðurin fyri lendið, sum skal keypast til rundkoyringina, er kr. 850.000 og tí eru játtaðar kr. 200.000 ov lítið.

Orsøkin til at biðið var um kr. 650.000 og ikki kr. 850.000, tá málið var fyri teknisku nevnd 16. februar 2009 er, at tølini eru tikin frá skeivari meting. Metingarmaðurin, sum metti um ognina, var í fyrsta umfari biðin um at meta um samlaða virðið á ognini. Við hesari meting kom metingarmaðurin fram til, at søluvirðið av samlaðu ognini var kr. 1.850.000,-. Í øðrum lagi skuldi metingarmaðurin meta um, hvussu nógv restvirðið á sethúsaognini var, um grundøkið verður skert við 334 fermetrum, sum er økið kommunan skal hava til rundkoyringina. Hetta restvirðið metti metingarmaðurin til kr. 1.200.000,-. Altso skuldi kommunan gjalda kr. 650.000 fyri lendið til rundkoyringina.

Eigarin av ognini var ikki nøgdur við metingina, tí hon metti, at metingarmaðurin ikki hevði tikið atlit til, at rundkoyringin fór at koma so tætt at húsahorninum, at tað ikki fór at verða møguligt at ganga rundan um húsini. Hetta fór at gera, at restvirðið á sethúsaognini neyvan fór at verða kr. 1.200.000,-.

Metingarmaðurin fekk hetta fyrilagt og gjørdi so eina nýggja meting. Samlaða søluvirðið av ognini broyttist sjálvandi ikki, men nú kom hann fram til, at restvirðið av sethúsaognini, um hon var skerd við teimum ætlaðu 334 fermetrunum, var kr. 1.000.000,-. Sostatt skal kommunan gjalda kr. 850.000,- fyri lendið til rundkoyringina.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at játta írestandi kr. 200.000 av íløgunum fyri vegir – konto fyri Marknagislvegin.

**Tekniska nevnd 5. mars 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 19. mars 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**86/09** **2009-0601**

**Umsókn frá kommunustjóranum um at verða loystur úr starvi**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í skrivi, dagfest 23. februar 2009, søkir kommunustjórin um at verða loystur úr starvinum soleiðis, at hann kann fara í feriu 19. juni 2009 og gevst so í starvinum.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at ganga umsóknini á møti.

**Býráðið 19. mars 2009:** Samtykt at taka undir við fíggjarnevndini.

**87/09** **2008-0268**

**Skriv frá Steen Juul Pedersen, har hann sigur seg úr løgtings- og fólkatingsvalstýrinum**

**Býráðið 19. mars 2009:** Samtykt at ganga áheitanini á møti.

## Mál uttan fyri skrá

**88/09** **1999-0606**

**Skipanarætlan fyri rennibreytina**.

**Lýsing av málinum, samandráttur.**
Býarskipanardeildin hevur, vísandi til mentamálanevndarsamtyktina dagfest 24. juni 2003, og samtyktina í byggi-og býarskipannevndini j. nr. 9902090-1, gjørt skipanarætlan fyri økið á Hálsi har ein rennibreyt er staðsett.

Uppskotið skipar økið við einari rennibreyt við 8 geirum og einum fótbóltsvølli inni í miðjuni.

Øki er lagt av til parkering og møguligar bygging til virksemið.

Skipanarætlanin leggur upp til at ásetingarnar fyri fyri økið skulu broytast frá at vera C2 - opin miðstaðarbygging til at verða D2 ítróttarøki fyri tað økið har rennibreyting liggur.

Ætlanin hevur eisini við sær, at onnur vegatgongd skal finnast til matr.nr. 1394 – sethús og grundstykki og matr.nr. 1408 b og 1408 c – ogn hjá Føroya Tele (dagstovnurin KURLAN).

Ein slík rennibreyt við einum fótbóltsvølli í miðjuni hevði verið eitt skilagott uppískoyti til Gundadal og á Hálsi sum ítrottarøkið.

Hjálagt er uppskot til skipanarætlan j. nr. 200202698-4

**Tilmæli:**
Deildarleiðarin í mentamálum mælir til at arbeitt verður víðari við málinum, og at ein byggiskrá verður gjørd fyri verkætlanina.

**Mentamálanevndin 21. apríl 2004:** Samtykt at arbeiðssetningurin verður soljóðandi:

**Arbeiðssetningur**
Arbeiðsbólkur verður settur at gera eina byggiskrá til ger av rennubreyt við tilhoyrandi økjum og útgerð í Tórshavnar kommunu.

**Byggiskráin skal m.a. innihalda:**
- Skipanarætlan fyri økið á Hálsi, sambært j. nr. 9902090-1, sum plandeildin hevur gjørt, herundir:
  - Stødd, plasering o.a.
  - Uttanduraøki
  - Hølisskrá
  - Atkomuviðurskifti
  - Útbyggingarmøguleikar
- Ognarviðurskifti
- Tíðarætlan
- Leiðbeinandi kostnaðarmeting, býtt sundir í:
  - Undirlendisarbeiðið
  - Breyt við 8 geirum
  - Miðøki við einum fótbóltsvølli
  - Uttanumøki, atkoma, parkering og møguligar bygging til ymiskt virksemið, t.d. gistingarhús.
  - Møguliga atkoma til verandi stadionøki

Bólkurin eigur eisini at hava fyrilit fyri myndugleikakrøvum og øðrum viðurskiftum, soleiðis at hesi verða lýst, nevnast kann m.a.:

<u>at</u> byggisamtyktini skal broytast frá at vera C2 – opin miðstaðarbygging til at verða D2 ítróttarøki.
<u>at</u> kommunan má ogna sær uml. 4000 $m^2$ frá matr.nr. 1393.
<u>at</u> vegatgongd til grannaognir skulu fáast upp á pláss.

Byggiskráin skal leggjast fyri mentamálanevndina í seinasta lagi 30. juni 2004.

Eisini samtykt at arbeiðsbólkurin hevur 3 limir:

1 umboð fyri Trivnaðarfyrisitingina, sum verður formaður
1 umboð fyri Teknisku fyrisitingina og
1 umboð fyri Sersamband fyri frælsan ítrótt

og at játta kr. 200.000 av konto 64 til byggiskránna.

**Mentamálanevndin 30. juni 2004:** Málið varð lagt fram og verður arbeitt víðari við málinum at leggja fyri nevndina aftur eftir summarfrítíðina.

**Mentamálanevndin 7. september 2004:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Avgerandi fortreyt fyri at økið kann brúkast til rennibreyt, er at broyting verður gjørd í byggisamtyktini, har økið verður broytt frá C2-opin miðstaðarbygging til at verða D2, ítróttarøki.

Serstøk byggisamtykt er fyri lítlan part av økinum, sum er kannaður traðarbrúki og velt lendi. Men við atliti til, at talan er um so lítlan part av verkætlanini sum verður umfataður av hesum, og vísandi til at aðrir vegir eru lagdir í økinum undir somu ásetingum, metir býararkitekturin ikki at hetta kann hava við sær at neyðugt verður at broyta serstøku byggisamtyktina.

**Tilmæli:**
Vísandi til samtykt 22. mars 2004, tá byggi- og býarskipanarnevndin góðkendi skipanarætlan fyri økið, soleiðis at arbeiðast kundi víðari við málinum at leggja fyri nevndina aftur. Býararkitekturin mælir til at nevndin tekur undir við ætlanini, so at farast kann undir at broyta byggisamtyktina fyri økið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. juni 2005:** Samtykt at taka undir við ætlanini, og at mæla býráðnum til at broyta byggisamtyktina sambært kortskjali 1999-0606/32, dagfest 13. juni 2005, frá C2 øki til D2 øki.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at góðkenna byggiskránna, dagfest 14. juni 2005, og at játta peningin, kr. 700.000,00, ið er tøkur á konto 64, til projektering

**Mentamálanevndin 14. juni 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og mentamálanevndini.

**Býráðið 23. juni 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at bjóða arbeiðið út.

**Mentamálanevndin 8. mars 2006:** Býararkitekturin greiddi frá málinum, sum verður viðgjørt á einum seinni fundi í mentamálanevndini.

**Mentamálanevndin 4. apríl 2006:** Útsett.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur kannað møguleikar fyri endaliga staðseting og skipan av rennibreytini og vil grunda á lýsinda tilfar, ið er fingið tilvega, mæla til, at farið verður undir at gera eina rennibreyt á Hálsi. Sí kortskjal nr. 19990606 dagfest. 19.05.2006.

Hjálagt er eisini kostnaðarmeting uppá verkætlanina og verður heitt á býráðið, umvegis fíggjarnevndina, at útvega neyðuga pening til verkætlanina.

Vísandi til avgerð í bygginenvndini um skipan av arbeiðinum, mælir nevndin víðari til, at tikið verður av innkomna undirhondsboð uppá arbeiðið at grava oman av á økinum. Hjálagt eru tvey innkomin undirhondsboð.

Vísandi til mannagongd fyri bygging/verkætlanir í Tórshavnar kommunu, mælir bygginevndin víðari til at senda málið til ummælis í hinum faknevndunum.

**Mentamálanevndin 24. mai 2006:** Tvey tilboð eru innkomin:

| | |
|---|---|
| Karl Patursson | kr. 1.189.050,00 |
| Robert Brockie | kr. 1.565.483,00 |

Mentamálanevndin samtykti at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, at taka av tilboðnum frá Maskinkoyring við Karl Patursson kr. 1.189.050,00.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 31. mai 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Ískoyti:**
Støðuplanur av verkætlanini hevur verið viðgjørdur í teknisku umsitingini.

Eftir sum einki ítøkiligt tekniskt projekt fyriliggur í løtuni, verður greitt frá verkætlanini og hvørji atlit eiga at verða tikin í sambandi við ymsum tekniskum viðurskiftum.

**Tilmæli:**

Býarverkfrøðingurin mælir til at arbeitt verður víðari við projektering av verkætlanini.

**Tekniska nevnd 1. juni 2006:** Nevndin mælir til, at verkætlanin eisini fevnir um betri atkomuviðurskifti frá Sundsvegnum og eina tryggari gonguleið til Gundadalsøkið umframt tekniskar veitingar so sum kloakk, vatn, ljós o.a. at leggja fyri nevndina aftur.

**Býráðið 8. juni 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Arbeitt hevur síðani verið við at kanna ymisk viðurskiftir í økinum, sum liður í endalig projektering. Hesar kanningarnar eru gjørdar í tøttum samstarvi við teknisku fyrisiting – tekniska deild og heilsu- og umhvørvisdeildir hjá TK og landinum, og hava hesar kanningarnar ført við sær, at ávíst neyvari kanningargreystur er neyðugur og kann hava við sær broytt arbeiðslag enn upprunaliga ætlað.

**Tilmæli frá ráðgeva:**
*Viðv.: Rennibreyt á Hálsi*
*Í samband við grevsturin av leysa áskotinum fram við Norðara Ringveg er gjørdur ein royndargrevstur í helluni, sum ætlanin var at spreingja seinni. Grevsturin er gjørdur við tí á staðnum verandi maskinu. Hellan er rættiliga stabbakend, og tað ber til at "grava" hana. Tilfarið, sum kemur frá maskinuni, sær út sum knúst tilfar, ið er sera væl hóskað til planering av m.a. veg- og parkeringsøkinum. Hetta opnar fyri møguleikanum at gera vegin oman til Kurlu við endaligari umlegging av instalatiónum, eins og at seta lyktafundamentir, kantsteinar í ytra borði og fáa skráan móti ringvegnum og Sundsvegnum lidnan í verandi arbeiðstøku. Í hesum umfari verður eisini nýggja parkeringsøkið við Kurlu gjørt.*

*Arbeiðið við grevstri á økinum, har gamli verkstaðurin hjá Tórshavnar kommunu stóð, er í løtuni lagt stilt orsaka av manglandi plássi í Húsahaga. Um farið verður undir omanfyri nevndu ætlan, kann hetta arbeiði fremjast, meðan TK greiðir viðurskiftini í Húsahaga, og harvið kann arbeiðið sum heild ganga víðari. Verður hendan ætlan framd, er næst komandi arbeiðsveiting eitt greitt definerað øki uttan fyribilsloysnir.*

*Parkeringsøkið, sum skal gerast á verandi ruskøki, verður planerað í staðin fyri at leggja grót í rúgvu. Hetta verður uttan gjald, tí tað er líka lætt at gera planeringina sum at leggja grót í rúgvu. Atkoman til Kurlu verður sum hon er í løtuni, til hon verður broytt til endaliga atkomu. Við hesi loysn verður soleiðis ikki neyðugt at gera fyribils atkomu tvørtur um ognina hjá Shell. Koyringin eftir ognini hjá Føroya Termovirki verður bert nýtt í sambandi við atkomu til vegin Undir Svartafossi. Vegurin frá gamla Sundsvegnum til ognina hjá Jóa og Randi Ziska, sum liggur á tyrving, kann eisini takast burtur í hesi arbeiðsgongd.*

*Sambært avtalu hava vit gjørt eina skitsuætlan fyri arbeiðsgongdina og tilhoyrandi tilboðslista fyri hesa arbeiðsveiting.*

*Maskinkoyring hevur givið hjálagda tilboð, dagfest 29.08.2006, uppá hesa arbeiðs-veiting, áljóðandi kr. 2.101.300,00 uttan mvg, og arbeiðið kann fremjast uppá 12 vikur. Um tað gerst neyðugt at brekka í støðum, verður einki eykagjald í hesum sambandi.*

*Vit hava kannað kostnaðin og vilja mæla ti, at tikið verður við tilboðnum. Er áhugi fyri hesi ætlan, vil Verkfrøðingastovan beinanvegin broyta projektið í samsvar við broyttu fortreytirnar.*

Bygginevndin er á fundi kunnað um hesa ætlan og hevur einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá Verkfrøðingarstovuni og mælir tískil býráðnum, umvegis fíggjarnevndina, til at taka av tilboðnum frá Maskinkoyring áljóðandi 2.101.300,00 kr. uttan mvg.

Víðari í málinum er TK í tí støðu at umhugsast skal, um ikki tað kann loysa seg at taka støðu til niðanfyristandandi tilmæli frá Verkfrøðingarstovuni grundað á trupulleikunum, sum standast av, at tyrvingarplássið í Villingardali, ikki sum er, er ført fyri at taka ímóti tilfar til tyrving.

*Vísandi til avtalu á fundi við bygginevndina 31.08.2006 hevur Verkfrøðingastovan 01.09.2006 sett fyrispurning til Heilsufrøðisligu Starvsstovuna um loyvi til at tyrva meginpartin av tilfarinum á staðnum í staðin fyri sum ætlað í Húsahaga.*

*Heilsufrøðisligu Starvsstovunan hevur við viðhefta skrivi, dagfest 07.09.2006, góðkent ætlanina við ávísum treytum.*

*Grundað á at loyvi er fingið til eina loysn, har tilfarið frá gamla ruskplássinum við serligari fyriskipan verður lagt út sum fylla undir rennibreytini, verður heitt á Tórshavnar kommunu um at geva Verkfrøðingastovuni heimild til at fara undir samráðingar við Maskingrevstur um í minsta lagi at gera neyðuga arbeiði við avgrevstri v.m. á matr. nr. 1395, soleiðis at tann ígongdverandi arbeiðstøkan, sum er steðgað, kann halda áfram, og øskan v.m.,. sum liggur á matr. nr. 1395, og sum fylla í vegnum Undir Svartafossi verður innbygd undir vøllinum.*

*Sum trýstið er á arbeiðsmarknaðinum í løtuni, meta vit tað rætt sum skjótast at gera avtalu við Maskinkoyring um framhaldandi arbeiði, tó sjálvsagt treytað av at semja fæst um kostnaðin.*

Bygginevndin er somuleiðis á fundi kunnað um hesa ætlan og hevur einmælt samtykt at taka undir við uppskotinum frá Verkfrøðingarstovuni og mælir tískil býráðnum, umvegis fíggjarnevndina, til at loyva Verkfrøðingarstovuni at innheinta eitt slíkt tilboð.

Býararkitekturin og ráðgevin koma á fund at greiða frá.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til, um mentamálanevndina, at taka undir við tilmælinum hjá bygginevndini og taka av tilboðnum hjá Maskinkoyring uppá kr. 2.101.300 uttan mvg og at taka upp samráðingar við Maskinkoyring um víðari arbeiðstøku.

**Mentamálanevndin 20. september 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við fíggjarnevndarsamtyktini 13. september 2006.

**Býráðið 21. september 2006:** Einmælt samtykt.

**Viðgerð av tilboðum uppá belegning til rennibreytina**
Polytan er komið við fullfíggjaðum tilboði uppá belegning til rennibreytina á Hálsi. Tilboðið ljóðar uppá 2.869.333 við útgerð. Uttan útgerð er tilboðið uppá 2.376.893.

Í byggiskránni er belegningur og undirlag mett til 3.6 mio. Í stórum tølum samsvarar hetta við tilboðið, um asfaltið verður roknað til 200 kr fermeturin ella 1.3 mio tilsamans.

Í kostnaðarmetingini er roknað við 13 mm belegningi. Eftir norsku ásetingunum er tjúgdin 15 mm belegningur. Tilboðið frá Polytan er við 15 mm belegningi.

Tilboðið frá Polytan er kannað. Prísirnir samsvara við prísum frá líknandi verkætlan í Noreg.

Mælt verður til at taka av tilboðnum uppá belegning til frá Polytan uppá kr. 2.376.893.

Málið um útgerð verður tikið upp á seinni fundi.

**Belegningur v.m.**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 2.1.1 | Kanning av undirarbeiði | 1 stk. | 12.000,00 | 12.000 |
| 2.1.2 | Verndartiltøk | 1 stk. | 8.000,00 | 8.000 |
| 2.1.4 | Byggiplássrakstur | 1 stk. | 12.000,00 | 12.000 |
| 2.1.5 | Byggipláss-skúr o.l. | 1 stk. | 8.000,00 | 8.000 |
| 2.2.1.1 | 15mm belegningur | 6.500 m² | 278,00 | 1.807.000 |
| 2.2.1.2 | belegningur í vatngrøv | 15 m² | 540,00 | 8.100 |
| 2.2.1.2 | Meirkostnaður fyri 22 mm | 134 m² | 177,00 | 23.718 |
| 2.2.1.2 | Meirkostnaður fyri kantar | 900 m | 12,00 | 10.800 |
| 2.2.1.3 | Satsplankar | 8 stk. | 5.400,00 | 43.200 |
| 2.2.1.4 | Stavkassi við lok | 1 stk. | 5.600,00 | 5.600 |
| 2.2.1.5 | Belegningur á lok | 3 stk. | 250,00 | 750 |
| 2.2.1.6 | Belegningur á lok | 3 stk. | 125,00 | 375 |
| 2.2.2 | Uppmáting-kontroll.merkjapl. | 1 stk. | 130.000,00 | 130.000 |
| 2.2.3 | Test | 1 stk. | 40.000,00 | 40.000 |
| 2.2.4 | Sargur | 1 stk. | 75.000,00 | 75.000 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 2.2.5 | Rakstrar og viðlíkahaldsætlan | 1 stk. | 6.000,00 | 6.000 |
| 2.2.6 | Kantsteinar | 480 m | 290,00 | 139.200 |
| 2.2.6 | Lok til vatngrøv inkl belegning | 1 stk. | 42.500,00 | 42.500 |
| 2.2.6 | Bummsett | 1 stk. | 4.650,00 | 4.650 |
| 2.2.6 | Ringur og stopplanki | 1 stk. | 5.500,00 | 5.500 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Belegningur tilsamans** | | | | **2.376.893** |
| Asfalt (mettur kostnaður) | 6.500 m² | 200 | 1.300.000 | **1.300.000** |
| **Tilsamans 1)** | | | | **3.676.893** |

1) í byggiskránni er henda veitingin u. útgerð mett til 3,6 mio.

**Tilmæli frá bygginevndini:**
Leivur Hansen, limur, er kunnaður um tilmælið og hevur boðað frá, at hann tekur undir við nevndini, og er hetta tískil ein samd nevnd, sum mælir til at taka av tilboðnum.

Bygginevndin fyri rennibreytina mælir til at taka av tilboðnum frá POLYTAN, áljóðandi 3.676.893 kr. uttan mvg.

**Mentamálanevndin 16. januar 2007:** Samtykt at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, at taka av tilboðnum frá POLYTAN, áljóðandi kr. 3.676.893,00 uttan mvg.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 1. februar 2007:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur á fundi viðgjørt verkætlanina og tey ynski, sum hava stungið seg upp í samband við arbeiðið. Verkætlanin er við hesum ynskjunum farin uppum kostnaðarmetingina, og skal málið tískil leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til støðutakan.

Hjálagt er fundarfrásøgn frá bygginevndini fyri rennibreyt á Hálsi.
Bygginevndin mælir til, at býráðið tekur av tilboðnum, sí hjálagt fundarfrásøgn og tilmæli frá bygginevndini.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2007:** Rúni Abrahamsen, ark., og Jákup E. Hansen, tekniskur stjóri, greiddu frá verkætlanini.

Samlaði kostnaðurin er mettur til tkr. 26.600. Av hesum eru játtaðar tkr. 3.000.

Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við bygginevndini og at játta tkr. 23.600 av íløgum 2007.

**Mentamálanevndin 22. februar 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við fíggjarnevndini 16. februar 2007.

**Býráðið 22. februar 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti í.s.v. endaliga uppgerð av kostnaðinum.**
Í sambandi við at verkætlanin Tórsbreyt er um at vera liðug, hevur bygginevndin gjørt eina fíggjaruppgerð í málinum.

Í kostnaðarmeting, dagfest 15. februar 2007, frá MAP arkitektar, ið er samskipandi ráðgevi í málinum, er verkætlanin mett at koma at kosta 26.600.000 kr. Henda meting varð viðgjørd í bygginevndini, og varð samtykt at mæla býráðnum, umvegis mentamálanevnd og fíggjarnevnd, at játta pening.
Hetta varð so gjørt, sí málsgongd í málinum. j.nr. 1999-0606.
Aftrat hesari játtan, legði bygginevndin umbøn fyri býráðið um at taka av einum tilboði frá arbeiðstakaranum uppá 2.733.000 kr. fyri burturbeining av øsku og ilsku, sum verkætlanin hevði rent seg í undir útgravingini til rennibreytina. Hetta var álagt kommununi av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.
Býráðið tók av tilboðnum, sí j. nr. 1999-0606

Við gjøgnumgongd av skjølunum í sambandi við endauppgerðina, er komið fram, at upprunaliga kostnaðarmetingin upp á 26.000.000 kr. frá 15.02.2007 var skeiv, og manglaðu uml. 3.400.000 kr í. Hetta merkir, at kostnaðarmetingin, sum átti at verið løgd fyri býráðið til støðutakan, sostatt átti at ljóðað uppá 30.000.000 kr. í staðin. Sí j. nr. 1999-0606 notat.

| | |
|---|---|
| Kostnaðarmeting (26.600 uppr.) | 30.000 |
| Meirkostnaður av øsku og ilsku | 2.733 |
| **Kostnaðarmeting íalt** | **32.733** |
| Íroknað 6,25% mvg | |

Bygginevndin hevur sostatt gjørt eina endaliga fíggjaruppgerð grundað á øll fyriliggjandi skjøl, knýtt at kostnaðinum, og uppgerð av manglum og eftirliggjandi arbeiðum.

Endaligur kostnaður sambært uppgerð frá Verkfrøðingastovuni

**Kostnaður rennibreyt við 6,25% mvg**
(sí uppgerð skjal j.nr. 1999-0606) **31.680**

Í sambandi við verkætlanina var neyðugt at gera seg inn á grannar í økinum, sum máttu lata lendið. Avtala varð gjørd við hesar grannar um makaskifti og ávís avleidd arbeiðir í samband við hetta.

**Onnur arbeiði við 6,25% mvg** **504**
(Kurla 228.270,03x 6.25% mvg)
(Matr.nr. 1394 & 1397 246.000.00x 6.25% mvg)

**Íalt 32.184**

Haraftrat hevur bygginevndin viðgjørt keyp av útgerð, sum hoyrir til slíkt annlegg fyri frælsan ítrótt. Avgjørt var at keypa tað, sum var krav fyri at kunna íðka treytarbundnu ítrottargreinirnar.

**Útgerð, sum kommunan hevur keypt 396**
**Íalt 32.580**

Bygginevndin hevur, sum vanligur liður í slíkum verkætlanum, eftirmett verkætlanina við atliti til at betra um fortreytir og virkishátt fyri einum slíkum tilboði til borgaran, og er leypandi komin fram á ting, sum kunna koma at sýnast sum manglar, og ting, sum vilja betra munandi um brúkið av Tórsbreyt. Hetta eru arbeiðir, sum ikki eru umbiðin enn, men sum bygginevndin metir eiga at fáa eina viðgerð í býráðnum.

Aðrar útreiðslur í.s.v. møguliga liðugtgerð 1.188
(sí j. nr. 1999-0606 kostnaðaruppgerð)

**Íalt 33.768**

Grundað á omanfyristandandi ber til at taka soleiðis samanum.

Býráðið hevur játtað íalt kr. 26.600.000 til verkætlanina, grundað á, kostnaðarmeting frá MAP, dagfest 15.02.2007. Henda upphædd átti at verið 30.000.000 kr.
Burturbeining av øsku og ilsku, álagt kommununi at burturbeina. Tilboð tikið av í býráðnum, áljóðandi 2.733.000 kr. Hetta er ein serstøk umbøn.
Útreiðslur avleiddar av verkætlanini, viðvíkjandi grannaognum, áljóðandi 504.000 kr. Her er serstakliga tað, ið er gjørt inni hjá dagstovninum KURLA, ein spurningur, um hetta alt eigur at leggjast til verkætlanina.
Keyp av útgerð til frælsan ítrott. Hetta var ongantíð partur av verkætlanini, men er síðan mett neyðugt at fáa við, áljóðandi 396.000 kr.

Endaliga kann sigast, at bygginevndin mælir til, at býráðið játtar pening til tær útreiðslur, sum undir "Aðrar útreiðslur í.s.v. møguliga liðugtgerð", áljóðandi 1.188.000 kr., mugu metast at betra um verkætlanina.

Bygginevndin harmast um broytta kostnaðin fyri verkætlanina, men metir tó, at kommunan við Tórsbreyt hevur fingið eitt annlegg í kommununi sum fer at leggjast til tilboðini til borgarin, og sum fer at merkjast innan trivnaðin og almennu fólkaheilsuna í stóran mun.

**Bygginevndin mælir til:**
Grundað á omanfyristandandi uppgerð verður við hesum biðið um írestandi fígging, soleiðis at samlaða játtanin fyri verkætlanina verður áljóðandi 33.768.000 kr.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini at játta kr. 7.168.000,00 av íløgum á skúla og mentan 2009.

**Mentamálanevndin 4. februar 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini 4. februar 2009, at játta kr. 7.168,000,00 av íløgum á mentan og frítíð 2009.

**Býráðið 19. mars 2009:** Einmælt samtykt.

**88/09** **2005-0380**

**Umval av býráðslimi til bygginevndina fyri bryggjuna og bingjuøki á Oyrareingjum sambært §36 í kommunustýrislógini**

**Býráðið 23. apríl 2007:** Vald vórðu Leivur Hansen og Bjarta Mohr.

**Býráðið 19. mars 2009:** Valdir vóru Jákup Símun Simonsen og Vagnur Johannesen.

**FUNDUR LOKIN KL. 19:20.**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Maria Súsanna Hammer Olsen | Bogi Andreasen |
| Marin Katrina Frýdal | Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Annfinn Brekkstein | Vagnur Johannesen | Levi Mørk |
| Sjúrður Olsen | Jákup Símun Simonsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |